Summarkapping 2008
LÝSINGARTILFAR

# Spa-eksplotión í Svøríki

**Mitt í meldrinum í Stokkholm er ein oasa opnað. Tað er Selma Spa Plus, ið heldur til á áttandu hædd i nýbyggda hotellinum Clarion Sign**

Clarion Sign er størsta og nýggjasta hotellið í øllum Stokkholm. Á einum av teimum ellivu hæddinum avgjørdi man at opna eitt sokallað spa.

Selma Spa í Sunne er tað eldsta spaði í Svøríki, og nýopnaða Selma Spa Plus er fyrsta dótturfelagið.

Í Svøríki kann ein tosa um eina rættuliga spa-eksplosión. Frá tí at Selma Spa opnaði á fyrsta sinnið 1991, eru hundraðtals onnur spa opnað á hotellum, hárfríðkannarhøllum, keypmiðstøðum og svimjihøllum.

Eitt tað nyggjasta innan hesa dillu eru "city-spa" har ein bara fer í nakrar tímar og tekur eina pausu frá meldrinum uttanfyri.

Tað er hetta, ið tey á Selma Spa Plus vóna at stokkholmarar og ferðafólk, fara at vilja gera hjá teimum.

Clarion Sign er eitt skandinaviskt hotel, og tað sæst aftur nógvastaðni. Norrmaðurin Petter Stordalen eigur hotellið, og allir møblar eru gjørdir av skandinavum. Inni á Selma Spa Plus eru tað stólarnir, "Eggið" og "Svanurin" hjá Arne Jacobsen, ið ein kann sita og hvíla sær beinini í, meðan bíðað verður eftir viðgerðini. Eisini kann ein fara út á tí vøkru altanina og njóta útsýni yvir Stokkholm og oynna



*Á Selma Spa Plus ber til at svimja uttandura á áttindu hædd*



*Nógvar ymiskar viðgerðir eru gjørligar at fáa*

Kungsholmen.

Vit á Sosialinum valdu okkum "Hot Stone Massage", ið er ein mykjandi viðgerð við heitum lavasteinum. Olja verður nýtt, og allur kroppurin verður myktur við teimum heitu steinunum. Tað sigst, at hitin frá steinunum er sera góður fyri vøddarnar og blóðreinslið.

Aðrar viðgerðir ein kann fáa eru andlitsviðgerðir við vitamin, djúp andlitsviðgerð og mini andlitsviðgerð, ið bara tekur 35 minuttir. Kroppsviðgerðir og manikyr og pedikyr kunnu eisini fáast. Men tað tey eru mest stolt yvir er tann upphitaði svimjihylurin á altanini, ið er opin fyri øllum vitjandi á Selma Spa Plus.

Eftir lokna viðgerð kann ein fáa sær eitt glas av "spa-vatni" við urtum ella frískum berum. Og hvíla í "boblustólunum" á terassini.

Kroppurin kennist sum nýggjur, og tá eg taki liftina tær átta hæddirnar oman á vegin er tað sum at hon ongantíð rættuliga lendir, og eg sveimi allan vegin heim.

Adressa: www.selmaspa.se

## Puntur nr. 13






sansir.fo

## Lyklaklár fígging og trygging til bilin

Ætlar tú at keypa bil, bjóða vit tær fígging og trygging um eina leið. Tú fert beint inn á bilasøluna, har tú fært landsins bíligastu og skjótastu fígging beinanvegin. Í somu vending avgreiða vit tryggingina. Tú fært lykilin og koyrir avstað.

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari